Álit

í

løgtingsmáli nr. 71/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um heilivág
(Nágreina at ferðandi kunnu hava við sær heilivág til egna nýtslu til landið)

Margit Stórá, landsstýriskvinna, hevur lagt málið fram 27. januar 2026, og eftir 1. viðgerð tann 5. februar 2026 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 19. februar 2026.

Við uppskotinum er talan um eina tøkniliga broyting, sum nágreinar, at ferðandi kunnu hava heilivág til egna nýtslu við sær til landið. Endamálið við uppskotinum er at nágreina ásetingina, soleiðis at hon greitt endurspeglar verandi siðvenju á økinum. Sambært verandi siðvenju kunnu ferðandi, sum ferðast til Føroya, hava heilivág til egna nýtslu við sær til landið.

Ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 19. februar 2026

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstforkvinna	Kaj Leo Holm Johannesen
Johan Dahl	Árni Skaale	Hans Jacob Thomsen
	Súsanna Bertholdsen	